

# Toy til skjúrt

Toy til skjúrt, ið er framleitt í Føroyum, fæst í litunum reytt/svart, reytt/blátt og blátt/blátt.

**Fæst í hesum handlum:**

- Norðoya Heimavirki
- Eysturoyar Heimavirki
- Skálabúðin
- Sonja Design
- Marjun Heimá
- Seymiskrínið
- Vágs Heimavirki
- Seymistovan

Mýrifípan
Telefon 31 43 35



## Skrivstovulærlingur

Søkt verður eftir skrivstovulærlingi at byrja, skjótast tilber.

Áhugað kunnu senda umsókn saman við prógvum og møguligum viðmælum til:

**P/F ArtiCon**
Postboks 3109
110 Tórshavn

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at tosa við Christian Danielsen, tel. 350 700 ella 21 61 73.

ARTICON
**á Hjalla · Postboks 3109 · 110 Tórshavn**
**tel. 350700 · fax 350705**






Søluleiðari okkara tekur við spennandi avbjóðingum uttanlands. Í hansara stað søkja vit nýggjan søluleiðara, ið framhaldandi kann styrkja og menna okkara søluarbeiði.

**Vit hugsa okkum, at tú:**

- helst hevur eina viðkomandi útbúgving innan sølu og marknaðarføring
- hevur royndir við B2B sølu
- hevur lætt við at samskifta við viðskiftafólk og starvsfelagar
- dugir at orða teg í talu og á skrift
- hevur lætt við at koma í samband við fólk
- hevur áræði, ert álítandi, nærlagdur og dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur sum fremsta mál at fáa kundarnar at kenna seg nøgdar

**Ábyrgdarøki**
Sum søluleiðari hevur tú ábyrgd av allari sølu og marknaðarføring, tað verður tín uppgáva at styrkja sambandið við viðskiftafólk okkara, eins og tú skapar samband við nýggjar kundar.

Fram um alt skalt tú virka undir tí grundleggjandi treytini: Eitt orð er eitt orð.

**Arbeiðsviðurskifti**
Á Føroyaprent bjóða vit tær eitt mennandi umhvørvi. Tú fært eitt avbjóðandi starv, sum er at menna størsta grafiska virkið í Føroyum. Málið er sjálvandi ein sunnur øktur umsetningur. Tú fert at virka undir stjóranum og í okkara leiðslubólki.

- løn sambært avtalu.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Vilt tú vita meira, so ring til Jon Hestoy, stjóra, á telefon 59 45 55.

**Umsóknarfreist 16. juni 2008.**

Skrivlig umsókn við CV verður at senda til:
Pf. Føroyaprent
att.: Jon Hestoy
Postsmoga 3118
110 Tórshavn

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI 541 705

**Føroyaprent**
Hoyviksvegur 59 · Postsmoga 3118 · 110 Tórshavn
Tel. 31 45 55 · fax 31 80 26 · hestoy@foroyaprent.fo



Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya

# Ískoytisútbúgving til Bachelor í sjúkrarøktarfrøði

Við heimild í Løgtingslóg nr. 2 frá 22. januar 2003 og uppskoti til kunngerð um ískoytisútbúgving til Bachelor í sjúkrarøktarfrøði byrjar ískoytisútbúgving til Bachelor í sjúkrarøktarfrøði í september 2008 á Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya.

**Endamál:**
Endamálið við ískoytisútbúgvingini til bachelor í sjúkrarøktarfrøði er:

- Førleiki í sjúkrarøktaryrkinum sum vísindagrein
- Ástøðilig uppstiging av sjúkrarøktarfakligu grundútbúgvingini og royndar- og vitanargrundarlagi sjúkrarøktarfrøðingsins frá starvsroyndum
- Lestrarfyrireikandi og upptøkugevandi førleiki til master- og kandidatútbúgvingar
- Førleiki at skilja granskingarverkætlanir og sjálv/-ur at luttaka í menningarverkætlanum

**Skipan og innihald:**
Útbúgvingin er sett at vera ½ ársverk ella 30 ECTS stig og fevnir um eitt ár.

Útbúgvingin skal vera lokin í seinasta lagi 2 ár eftir, at hon er byrjað.

**Ískoytisútbúgvingin er býtt sundur í 3 eindir**

- Ein grundleggjandi kravd eind (heystið 2008)
- Ein valfrí eind (várið 2009)
- Bachelorverkætlanareind (vár/summar 2009)

Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya ger av, eftir ítøkiliga meting í hvørjum einstøkum føri, at útbúgvingarpartar, sum lesandi hevur staðið eftir reglum fyri eina aðra framhaldsútbúgving, heilt ella lutvíst kunnu koma í staðin fyri samsvarandi útbúgvingarpartar.

**Fígging:**
Útreiðslur til bókmentir og annað tilfar.

Nærri lýsing av útbúgvingini, undirvísingardagar í heyst og umsóknarblað liggja á heimasíðuni www.srfs.fo undir ískoytisútbúgving.

Eru spurningar, ber til at venda sær til útbúgvingarleiðaran á Sjúkrarøktarfrøðisskúla Føroya tlf. 352266

**Umsóknarfreist**
Umsóknarfreistin er 18. juni kl 16:00. Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og øðrum upplýsingum skal sendast til:

Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya
J. Broncksgøta 25
100 Tórshavn

**SJÚKRARØKTARFRØÐISKÚLI FØROYA**
**Jónas Broncksgøta 25 · FO-100 Tórshavn · tel: 352 250**
**fax: 352 251 · heimasíða: srfs.fo · t-postur: srfs@srfs.fo**